VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið



Veðrið í morgin:
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og regn. Seinnapartin upp í skrið av útnyrðingi og ælingur, partvís kavi. Hitin millum 1 og 4 stig.



Veðrið leygardagin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útnyrðingi og kavaælingur, seinnapartin minkar hann vindin niður í eitt lot og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 2 og 5 stig.



Veðrið sunnudagin:
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar, men seinnapartin snarar hann í eystan og kavaælingur. Hitin millum 1 og 4 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Upp í stívt andøvsgul av eystri og landnyrðingi, týsdagin hækkar hann upp í norðan. Mánadagin kavaælingur, men týsdagin yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin um frostmarkið.

Eivør kann aftur gerast besta songkvinna íslands

Eivør Pálsdóttir er enn einaferð tilnevnd at verða »Ársins Besta Songkvinna« av Íslendsku Tónlistarvirðisløunum. Hesa ferð saman við mætum nøvnum sum heimskendu Bjørk og songkvinnuni Urður Hákonardóttir úr elektroniska dancebólkinum, Gus Gus

TÓNLEIKUR
Sunneva H. Eysturstein
sunneva@sosialurin.fo

Spurd, hvønn týdning tilnevningin hevur, sigur Eivør:

- Tað er sjálvandi ein stórur heiður at verða tilnevndur hesa virðisløninа. Nú búgvi eg ikki eingongd í landinum, so tað hevur nógv at siga fyri meg, at tey enn hava meg í tonkunum, tá tey skulu handa virðisløninа.

- Eg hugsi ikki so nógv um endiliga at vinna. Bara tað at verða tilnevndur, er nóg mikið í sær sjálvum. Eg eri eisini biðin um at vera við í tiltakinum og sjálv at handa onkrar virðisløninа, so í grundini gleði eg meg bara at sleppa yvir at møta øllum hesum deiligu persónunum, sum eg kenni frá mínari tíð í Íslandi.

Tilnevningar á rað

- Eg fari fyrst til Danish Music Awards Folk handanina í Tønder í Danmark, har eg eri instillað til fimm virðisløninа. Og so beinleiðis til Íslands aftaná. Eg eri ógvuliga glað fyri at sleppa at vera við til hesi stóru tiltøkini. Tað hevur stóran týdning fyri meg og tað, sum eg geri, leggur Eivør dent á.

Mangt í skjáttuni

Hetta er triðju ferð Eivør er tilnevnd heiðurin sum »Ársins Besta Songkvinna« í Íslandi. Fyrstu ferð var í 2003, tá hon var einans 19 ára gomul, aðru ferð í 2005.

Í 2003 vann hon heiðursløninа umframt eisini at gerast »Besti Framførari« í Íslandi tað árið.

Í 2005 gjørdust tilnevningarnar ikki til vinningar, men ístaðin vann hon aðra íslendska heiðursløn, tá Gríma (Íslendska Sjónleikaravirðisløninа) varð handað. Frá Grímu fekk Eivør heiðursløninа fyri »Besta Teaturtónleik«, ið hon hevði skrivað til leikin Úlfhamssaga, ið varð leikstjórnaður av Mariu Ellingsen.

Bloodgroup og Múgison við í hópinum

Ein annar føroyingur er eisini sloppin upp í leikin í Íslandi. Nýggi elektro-popp bólkurin Bloodgroup við føroyska Janusi Rasmussen á odda (Eisini kendur úr bólkinum Lama Sea) er nevniliga tilnevndur at verða »Bjartasta Vónin« á ársins tónlistarvirðisløunum í Íslandi.

Onnur, ið vit kenna, sum eisini eru við í hópinum, eru m.a Múgison. Múgison er tilnevndur heiðurin sum »Ársins Besti Sangari«, og nýggjasta fløga hansara, »Múgiboogie« er tilnevnd at verða »Ársins Besta Útgáva - Rokk«.

Bjørk, sum áður hevur vunnið hópin av virðisløunum bæði av hesum slagnum og mongum øðrum altjóða við, er afturat »Ársins Besta Songkvinna« eisini við fløguni »Volta« tilnevnd at hava »Bestu Útgávu - Ymiskt« og at verða »Besta Tónlistarnavn« saman við m.a Gus Gus.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	-7
Nuuk	-3
Qaqortoq	-3
Ammassalik	-4
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	-
Seyðisfjørður	0
Tórshavn	4
Lerwick	5
Aberdeen	5
London	9
Tromsø	--
Bergen	4
Oslo	--
Stokkhólm	7
Keypmannah.	8
Helsinki	1
Moskva	1
Berlin	8
Warzawa	7
Kiev	4
Bukarest	12
Paris	11
Madrid	13
Róm	14
Malorca	18
Athen	--
Malta	16
Tunis	20
Beijing	8
New Dehli	22
Bangkok	30
Jakarta	24
Sydney	--
New York	7
Miami	25
Los Angeles	15
Meksikobýur	23
Panama	--
La Paz	11
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	28

LUFTTRÝSTIÐ



Í gjár:
Eitt lágtrýst, 982 hPa. yviri á Eysturlandinum fer spakuliga eystureftir. Eitt annað lágtrýst, 985 hPa. sunnan fyri Hvarvið kemur móti Føroyum og dýpist.



Í dag.
Lágtrýstið vestan fyri Føroyar fer eystureftir og dýpist. Tað gevur eitt skifti skrið ella storm á okkara leiðum

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 25/2 kl. 06⁰⁰ – 26/2 06⁰⁰. Hitin í gjár: 4,8°
Minsti hiti máldur í februar: -11° - Mesti hiti máldur í februar: 11°

AVFALLIÐ



Avfallið: 2,0 mm – mált frá 25/2 kl. 06⁰⁰ – 26/2 06⁰⁰.
Avfallið higartil í februar: 95 mm

VESTFALLSKYRRINDI

21. feb.	Fullmáni
28. feb.	Mánin longst frá jørðini
29. feb.	Seinna kvarter

Kelda: Almanakkin 2008

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
27. feb.	10.57	23.19	09.57	22.19	10.12	22.34	00.35	12.57	01.35	13.57	09.12	21.34	08.12	20.34	11.12	23.34	-	12.12	10.42	23.04	11.57	-
28. feb.	11.42	-	10.42	23.31	10.57	23.46	01.19	13.42	02.19	14.42	09.57	22.46	08.57	21.46	11.57	-	00.34	12.57	11.27	-	00.19	12.42
29. feb.	00.31	12.56	11.56	-	-	12.11	02.31	14.56	03.31	15.56	11.11	23.44	10.11	22.44	00.46	13.11	01.46	14.11	00.16	12.41	01.31	13.56
1. mrs.	01.29	14.06	00.29	13.06	00.44	13.21	03.29	16.06	04.29	17.06	-	12.21	11.21	23.44	01.44	14.21	02.44	15.21	01.14	13.51	02.29	15.06
2. mrs.	02.29	14.52	01.29	13.52	01.44	14.07	04.29	16.52	05.29	17.52	00.44	13.07	-	12.07	02.44	15.07	03.44	16.07	02.14	14.37	03.29	15.52

Alt um harmonikur

www.simme.eu